# ósdagin





Kristian Davidsen, strandferðslustjóri, segði eisini nøkur orð, tá Smyril varð doyptur





Løgmaður skrivar í gestabókina hjá nýggja Smyrli leygardagin



Sum vit hoyrdu í Útvarpinum sunnudagin, doypti hon Smyril við hesum fyndarorðum:

*Tú boðar um ljósar tíðir.*
*Tú álit suðuroyinga ver.*
*Ein knørrur so snøggur og fríður,*
*sum framburð til oynna ber.*
*Má Harrin signa verkið*
*og føra teg trygd í Havn.*
*Tað verið tí stavnamerki*
*og Smyril verður títt navn*

Sum siður er har um leiðir, signaði ein prestur eisini skipið.

Vit hava fleiri ferðir sæð myndir av nýggja Smyrli uttan, men í dag kunnu vit eisini vísa, hvussu hann sær út innan. Og sum tað sæst, er talan um eitt avbera snotiligt skip og umstøðurnar hjá ferðafólki eru sera góðar.

Vit lata myndirnar tala fyri seg.